# náttu kannast fyri





*Her verða Ernst og Andra vígd í ortodoksari kirkju. Tey bæði uttast á myndini eru brúðargubbarnir hjá henni*



*Tey búgva í Ploiesti við 250.000 íbúgvarum*



*Øll skuldu vera limur í Pioner, ungmannafelagsskapinum hjá kommunista-flokkinum. Her luttekur Andrea tv í einum tiltaki. Sjálv ber hon flaggið hjá kommunistaflokkinum, meðan drongurin ber rumenska flaggið*

verður Ceaucescu aðalskrivari í ráðandi kommunistaflokkinum. Í 1967 verður hann forseti og fær so at siga alt vald. Fram til 1978 vóru liviumstøðurnar sum so í lagi. Men tá setur Ceaucescu sær fyri sum skjótast at fáa afturgoldið alla uttanlandaskuld hjá Rumenina. Hann hevði verið á vitjan í Norður Korea, og her helt hann seg hava nakað at læra!

Hetta merkti aftur, at tað sansaði at hjá fólkinum. Nú fór aftur nærum øll framleiðsla av landinum fyri at náa hesum máli at gjalda uttanlandaskuldina.

Úrslitið varð, at í Rumenia var stórt sæð tørvur á øllum. Ravmagnið varð kvett, meðan tað vóru 30 kuldastig úti. Hetta merkti 10 kuldastig inni. Bensin var skamtað til 40 litur um mánaðin, sum ikki strekti tað stóra, serliga tá familjan búði 250 km burtur. Tað var eisini neyðugt at standa í kø í dagar fyri at fáa bensin.

Tað ringasta var tó hetta við at standa í bíðirøð á handlunum. Tað var nærum einki at fáa av nøkrum slag. Tað mátti farast upp á miðjari nátt fyri at fáa so grundleggjandi vørur sum kjøt og mjólk. Og tey sum stóðu seinast í røðini fingu ofta einki.

Men ofta kundi nógv fáast burtur úr lítlum. Fekst fatur á einum lítlum kúllingi, kláraði mamman at gera eina góða máltíð fyri øll trý burtur úr.

## Fólkið innibyrgt

Samstundis varð fólkið fullkomiliga innibyrgt. Tað fekk nærum ongan møguleika fyri sambandi til umheimin.

At ferðast vestureftir kom als ikki uppá tal. Her var jú stórur vandi fyri, at fólk ikki komu heim aftur. Skuldi ferðast til onnur kommunistisk lond, skuldi hetta vera í bólki saman við øðrum. Hetta gav møguleika fyri eftirliti við hvørjum einstøkum.

Tann sjálvstøðugi uttanríkispolitikkurin hjá Rumenia móti Sovjet gjørdi eisini, at fólk úr Moskvatrúgvu londunum heldur ikki sluppu til Rumenia.

Fólk fingu ikki pass heldur. Skuldi farast uttanlands í arbeiðsørindum fekk viðkomandi eitt arbeiðspass, sum hann skuldi lata frá sær til myndugleikarnar, tá ið komið varð heim aftur.

## Sjúkligt eftirlit við fólkinum

Tað allarringasta var tó politiska eftirlitið við fólkinum, sum virkaði heilt sjúkligt, tá vit onnur hoyra um tað.

Hvør borgari skuldu tvær ferðir árliga skriva sína egnu søgu niður til brúk fyri myndugleikarnar. Her skuldi einki dyljast. Meginparturin kom sjálvsagt at vera endurtøka, og tí skuldu alt samsvara hvørja ferð. Annars kundu tey fáa okkurt at svara fyri!

Øll ræddust tað loyniliga politiið. Tað kundi vera alla staðni. Tað var eisini alment kent, at loyniløgreglan hevði eitt umboð á hvørjum arbeiðsplássi. Øll livdu í ótta. Tí ráddu um at siga sum